**Ítróttur**

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Ivamál um fremsta plássið

*Í FSF verður í løtuni kannað, hvat lið í løtuni er á odda í bestu deildini. Hetta tí tað ikki stendur greitt ásett í kappingarreglunum, hvussu farast skal fram, tá lið eru jøvn í stigum*

JÁKUPMØRK

Í nakrar vikur hevur verið tosað aftur og fram um, hvussu farast skal fram, um tvey ella fleiri lið standa jøvn í stigum, tá landskappingin í fótbólti er komin at enda.

Orsøkin til hetta prátið hevur sjálvandi verið javna oddastríðið, har HB, VB og B68 skiftivís hava ligið á odda, og heilt spennandi gjørdist tað eftir 16. umfar, tá HB og VB brádliga vóru jøvn í stigum.

A aðalfundinum hjá FSF vórðu í vár samtyktar nýggjar reglur fyri, hvussu farast skal fram í slíkum førum, men hesar reglur tykjast tó ikki so greiðar, sum ynskiligt hevði verið.

Staðfest varð tá, at innanhýsis uppgerðir telja fyrst, tá talan er um javnleik í stigatalum, men í førinum VB-HB, varð hr talan um tveir javnleikir. 2-2 í Havn og 0-0 í Vági. Vágbingar vilja sjálvandi vera við, at tað telur til teirra fyrimun, at teir hava skotið fleiri mál á útivølli, meðan tey í HB meta, at hetta ikki hevur nakað at siga í hesum føri.

### Reglurnar eru ikki útgreinandi

Tað er grein 33, petti 2 í kappingarreglunum, sum ger av, hvat lið er á odda, um talan er um javnstøðu. Í greinini stendur:

»Standa tvey ella fleiri lið á jøvnum í stigum, eru innanhýsis dystir avgerandi fyri raðfylgjuna. Stendur framvegis á jøvnum, er málmunurin avgerandi fyri raðfylgjuna. Er málmunurin hin sami, er tað liðið fremst, ið hevur flest vunnin mál. Stendur framvegis á jøvnum, verður nýggjur dystur ásettur at leika á uttanveltaðum vølli. Stendur á jøvnum eftir vanliga leiktíð, verður umdystur leiktur samsvarandi grein 5, stk. 2. Er støðan framvegis javnleikur, verður sektarsparkskapping samsvarandi grein 5, stk. 5.«

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sigur við Sosialin, at FSF hevur sent fyrispurning til løgfrøðisligu ráðgevar sínar um, hvussu lógin eigur at tulkast.

- Stóri trupuleikin er, at grein 33, petti 2, ikki er nóg greinandi, tí tað stendur ongastaðni greinað, hvussu langt farast skal, tá tosað verður um innanhýsis dystir, sigur hann. Er talan bara um stig, um stig og mál ella stig mál og møguliga mál vunnin á útivølli, er sostatt ein opin spurningur.

Nógv hevur annars verið tosað um, at tað er grein 5, petti 3, sum eigur at vera avgerandi í slíkum føri. Ísak Mikladal vísir tó á, at tað eisini er ivasamt, um hendan er galdandi. Harafturat er eisini ivi um, hvussu hendan skal tulkast, um so er, at hon verður mett at vera galdandi

*Enn er ikki avgjørt, hvørt HB ella VB kunna rópa seg føroyameistara, um verndi javnstøðan í stigum stendur við*

Í grein 5, petti 3, stendur, at um talan er um tveir finalu- ella hálvfinaludystir í lands- ella steypakapping ella upp og niðurflytingardystir er galdandi, at um tað stendur á jøvnum eftir báðar dystirnar, telja mál, vunnin á útivølli, dupult.

Ísak Mikladal vísir í hesum sambandi á, at tað ongastaðni í grein 33, petti 2, verður víst til grein 5, petti 3. Harafturat vísir hann á, at grein 5 ikki umfatar støðuna, tá tvey ella fleiri lið standa á jøvnum í landskappingini.



### Svarið er ávegis

Sum nevnt, so hevur FSF sent fyrispurning til løgfrøðisligu ráðgevar sínar, og fyrr enn hetta er komið, vil Ísak Mikladal ikki gera nakra niðurstøðu í málinum.

Í fyrispurninginum hevur FSF annars eisini biðið um svar um, hvussu farast skal fram, um talan er um fleiri enn tvey lið, sum standa á jøvnum. Henda støða kann eisini íkoma longu komandi vikuskifti. Hetta verður støðan, um B68 vinnur á VB suðuri í Vági, samstundis sum B36 vinnur á HB.

Niðurstøðan úr øllum hesum má so vera, at tað enn ikki er greitt, hvat lið í løtuni er á odda í bestu deildini.

Ísak Mikladal sigur, at spurningurin væntandi verður svaraður, áðrenn 17. og næst seinasta umfar í landskappingini verður leikt sunnudagin.

# AB er steðgað upp

*Akademikararnir hava ikki vunnið síðani teir sendu B36 úr Europa Cup kappingini*

Henda greinin snýr seg ikki um Argja Bóltfelag. Teir hava, sum tað man vera øllum teimum kunnugt, ið fylgja við í Ítróttarsosialinum, eitt lið í 3. deild. Teir taptu 4–2 á Svangaskarði sunndagin, og harvið kunnu vit siga, at teir eru uppsteðgaðir. Hvussu tað gekk fyri seg í tí dystinum, venda vit vónandi aftur til í blaðnum í morgin.

Henda greinin snýr seg um donsku superliguna, har fýra føroyskir landsliðsspælarar taka lut, og serliga um AB, sum fyri einum góðum mánað síðani sendi B36 úr Europa Cup. Teir vunnu heili 8–0 á heimavølli og 1–0 á Tórsvølli.

At tað kann ganga skjótt hvønn vegin í fótbólti, er gongdin hjá AB síðani summarsteðgin gott dømi um. Tá teir vunnu sannførandi ímóti B36, lógu teir í toppinum í superliguni, teir spældu besta fótbóltin í Danmark, og tað varð mett, at landsliðsmenninir Brian Steen Nielsen, Michael Johansen og Jan Michelsen mannaðu besta miðvøllin í Danmark.

Síðani 1–0 sigurin á Tórsvølli hevur AB bara tapt. Teir hava ongan møguleika í Europa Cup, og eftir tapið mánakvøldið á heimavølli ímóti Brøndby eru teir triði niðast í superliguni. Teir hava níggju stig, sum er tað sama sum Óli Johannesen og AGF hava á næstaftasta plássinum.

Brøndby, sum stóð seg illa á heimavølli í Europa Cup í síðstu viku, vann 4–0. Talan var um fjórða AB tapið á rað í superliguni, og nú verður tosað um kreppu og møguleikan at skifta venjararnar báðar út.

Sviin Mattias Jonson setti hol á, tá ein hálvur tími var farin, sjey minuttir seinni økti toppskjúttin í superliguni Peter Graulund, á tímaslagnum var Mattias Jonson aftur upp á spæl, og tá eitt korter restaði, staðfesti Ruben Bagger frammanfyri 5.105 áskoðarum eyðmýkingina av AB.

Við sigrinum lyfti Brøndby seg upp á næstfremsta plássið, og harvið trýstu teir FCK niður á fjórða plássið. Sunnudagin fer Herfølge at vitja OB í Odense, og FCK fer at spæla á útivølli í Silkeborg. AB skal á útivølli ímóti FC Midtjylland royna at venda óhepnu gongdini. Tað verður ivaleyst torført, tí higartil hevur FCM staðið seg óvæntað væl. Brøndby fær á heimavølli vitjan av AaB. Fyrsti dysturin í 10. umfarinum verður longu fríggjakvøldið, tá Lyngby fær vitjan av Viborg.

AGF fær mánakvøldið vitjan av uppflytarunum og botnliðnum úr Haderslev, sum higartil bara hevur fingið eitt stig.

JH

**Úrslit, danska superligan**

| | | |
|---|---|---|
| 17.09.00 | Herfølge-FC Midtjylland | 0-1 |
| 17.09.00 | FCK-OB | 1-0 |
| 17.09.00 | Haderslev-Lyngby | 2-4 |
| 17.09.00 | AaB-AGF | 2-1 |
| 17.09.00 | Viborg-Silkeborg | 1-1 |
| 18.09.00 | AB-Brøndby 0-4 | |

**Komandi dystir**

| | |
|---|---|
| 22.09.00 | Lyngby-Viborg |
| 24.09.00 | FC Midtjylland-AB |
| 24.09.00 | OB-Herfølge |
| 24.09.00 | Silkeborg-FCK |
| 24.09.00 | Brøndby-AaB |
| 25.09.00 | AGF-Haderslev |

**Støðan, danska superligan**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Lyngby | 9 | 6 | 0 | 3 | 17 | 15 | 2 | 18 |
| 2 | Brøndby | 9 | 5 | 2 | 2 | 25 | 8 | 17 | 17 |
| 3 | FC Midtjylland | 9 | 5 | 2 | 2 | 16 | 9 | 7 | 17 |
| 4 | FCK | 9 | 5 | 1 | 3 | 12 | 7 | 5 | 16 |
| 5 | Silkeborg | 9 | 4 | 4 | 1 | 12 | 14 | -2 | 16 |
| 6 | OB | 9 | 4 | 1 | 4 | 14 | 7 | 7 | 13 |
| 7 | Viborg | 9 | 3 | 4 | 2 | 10 | 7 | 3 | 13 |
| 8 | AaB | 9 | 4 | 1 | 4 | 13 | 14 | -1 | 13 |
| 9 | Herfølge | 9 | 3 | 1 | 5 | 12 | 20 | -8 | 10 |
| 10 | AB | 9 | 2 | 3 | 4 | 12 | 14 | -2 | 9 |
| 11 | AGF | 9 | 3 | 0 | 6 | 11 | 19 | -8 | 9 |



# Fleiri føroyingar í steypaeldin í dag

*FCK, AGF og OB skulu í kvøld í fjórða umfarinum í donsku steypakappingini spæla ímóti lægri staddum liðum*

Føroysku landsliðsspælararnir í donsku superliguni fáa í hesum døgum nógva dystarvenjing. Í dag og í kvøld verður sjøtul settur á fjórða umfarið í donsku steypakappingini, sum kallast DONG Cup. Higartil hava bara feløg í lægru deildunum luttikið. Men í kvøld skulu nøkur feløg í superliguni upp í part. Jákup Mikkelsen og Herfølge sleppa at hvíla seg eitt sindur afturat. Tey feløgini, sum síðsta kappingarár endaðu ovast í superliguni, skulu ikki spæla í steypakappingini fyrrenn í fimta umfarinum.

Millum superligu feløgini, sum skulu spæla í kvøld, eru FCK, AGF og OB. Tey skulu øll spæla ímóti liðum, sum í landskappingini spæla í lægru deildunum. Men tað vil ikki siga, at superligufeløgini ikki nýtast at seta øll segl til. Serliga hjá AGF og OB ber tað til at ímynda sær, at mótstøðan verður stór, tí talan verður um grannastríð.

Longu klokkan 16.30 skulu AGF og FCK í eldin. Óli Johannesen og teir skulu spæla í Århus ímóti FC Århus, sum er ein samanrenning av fleiri av sum er ein samanrenning av fleiri av smáu feløgunum í Århus. Dreymurin hjá teimum er av bjóða AGF av í stríðnum um fótbóltstrónuna í jyska høvuðsstaðnum. Í løtuni er AGF niðarlaga statt á støðutalvuni, og tá havt verður í huga, hvussu illa tað stendur til fíggjarliga í felagnum hjá Óla Johannesen, kann tað væl hugsast, at lítli beiggin so at siga tevjar blóð.

Todi Jónsson og FCK skulu eisini spæla í Jyllandi. Teir skulu vitja Vejen, sum í landskappingini spælir í danmakrsseriuni.

Í kvøld klokkan sjey skulu Johan B. Hansen og OB dystast ímóti B 1909. Grannauppgerðirnar millum hesi bæði stórfeløgini í Odense hava altíð savnað nógv fólk. Nú er OB í superliguni, meðan B 1909 er í triði bestu deildini. Men tað er kortini einki at ivast í, at ein rúgva av fótbóltshugaðum fjónbúgvum fara til fótbólt í kvøld – sjálvt um kappingin frá europeisku meistarakappingini og OL er stór í sjónvarpinum.

JH

# Nýggjur málverji í FCK

*32 ára gamli kanadiarin vardi málið, tá Kanada í 1989 í Klaksvík vann 1–0 á Føroyum*

Sunnudagin var greitt, at FCK fær ein spælara afturat á lønarlistan. Hesa ferð er talan um ein málverja. Hann er keyptur frá skotska vinarfelagnum hjá FCK, sum eitur Dundee United.

Málverjin er ættaður úr Kanada, og hann spældi í USA, áðrenn hann fyri einum ári síðani kom til Skotlands.

Todi Jónsson kann tosa um Føroyar og Klaksvíkina við nýggja málverjan, sum eitur Pat Onstad og er 32 árra gamal. Í 1989 var kanadiska landsliðið í Føroyum og spældi tveir landsdstir. Føroyingar vunnu 14. apríl 1–0 í Gundadali (Torkil Nielsen skoraði málið longu i 4. minutti). Seinni dysturin varð spældur í Klaksvík 16. apríl. Ta ferðina vann Kanada 1–0. Drew Ferguson skoraði málið, tá tað restaðu tólv minuttir.

Sambært landsliðsbókini vardi ein, sum eitur Paul Dolan, kanadiska málið í fyrra dystinum. Hann var skrásettur í einum felag við navninum Hamilton Steeles. Í tí seinna dystinum vardi Pat Onstad, sum tá hevur verið umleið 21 ára gamal, kanadiska málið. Hann var tá skrásettur í Winnipeg Fury.

Í FCK hava teir frammanundan tveir málverjar. Síðani summarsteðgin hevur 20 ára gamli Rune Pedersen verið fínur ímillum stólparnar. Hin málverjin eitur Michael Stensgaard. Hann hevur verið nógv skaddur seinastu tíðina, og tí hevur FCK leiðslan mett, at tað var neyðugt at keypa ein málverja afturat. Í Dundee United megnaði Pat Onstad ikki at vinna fyrsta málverjuplássið.

JH

# HB komið undan

*2. deild: HB vann seg upp úr botninum við útisigri á GÍ, men hinvegin mugu gøtumenn nú ansa sær í botnstríðnum*

Um fótbólturin verður vigaður í nærdystum og ferð, so nyttaði tað lítið í Sarpigerði leygardagin. Um fótbólturin vektin telur í málmøguleikum og málum, so var talan um fínt undirhald. Undirhaldsvirðið verður gjørt upp í øllum teimum omanfyri nevndu lutunum. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað var upp og niður.

Í løtuni undan steðginum tóktist tað sum um heimaliðið skuldi enda omaná. Fimm minuttir restaðu, tá Heini Heinason, sum arbeiddi nógv, fór til baklinjuna í høgru og spældi til nærra stólpa, har Bárður Heinason stútaði í málið. So var 2–2, og í minuttinum aftaná var tað miðvallarin Omar Pálsson, sum aftur var upp á spæl. Úr átta metrum heilfluktaði hann skrábólt úr høgru frá Heina Heinason upp í nettakið.

GÍ var komið framum beinanvegin. Omar Pálsson skoraði, tá hann var leysur í brotsteiginum.

Janus Rasmussen og Símun Petur Justinussen mannaðu GÍ miðverjuna saman við Boga Jacobsen. Teir lógu frammarlaga, og tað var matur fyri kviku HB álopsspælararnar Gunnar Mohr og Eyðun Samuelsen, sum skoraðu fýra av teimum seks HB málunum og sum misnýttu fleiri møguleikar – t. d. hevði Gunnar tveir risa stórar møguleikar beint undan steðginum.

Eyðun Samuelsen javnaði til 1–1, tá hann krúllaði seg leysan í vinstru og sendi í handara síðunetið. Gunnar Mohr átti annað HB málið við rubb og stubb. Eftir GÍ horna fekk HB formaðurin bóltin á egnum brotsteigarmarki. Hann rak og rak, snýtti annan verjumannin, og tá hin hevði eyguni meiri eftir álopsfelaganum, smekkaði Gunnar í netið aftanfyri Mortan Joensen.



*Við sigrinum á GÍ slapp HB sær upp um niðurflytingarstrikuna, sum hevur verið ein hóttan meginpartin av árinum*

Beinanvegin í 2. hálvleiki endurtók Eyðun Samuelsen fyrsta málið hjá sær, og so gekk undan hjá HB, meðan GÍ einki fekk burturúr, sjálvt um teir á heimaliðnum høvdu bóltin nógv. GÍ málverjin má taka ábyrgdina av leiðslumálinum hjá HB, sum aftasti maðurin Sámal Erik Hentze skoraði beinleiðis upp á fríspark næstan av miðjuni. At HB var á odda gjørdi, at heimaliðið gjørdist uppaftur meiri álopshugað, og tað gjørdi, at fyritreytirnar hjá Eyðuni og Gunnari vórðu uppaftur betri. Eyðun økti til 5–3, áðrenn innskifti Ransin Djurhuus sneiddi fleiri av sær og staðfesti sigurin, sum hevur við sær, at HB hevur trygt fyri, at teir varðveita plássið í næstbestu deildini.

JH

**2. deild: GÍ–HB 3–6 (3–2)**

1–0: Omar Pálsson
1–1: Eyðun Samuelsen
1–2: Gunnar Mohr
2–2: Bárður Heinason
3–2: Omar Pálsson
3–3: Eyðun Samuelsen
3–4: Sámal Erik Hentze
3–5: Eyðun Samuelsen
3–6: Ransin Djurhuus

# LÍF í tungum sjógvi

*2. deild: Móti einum væl mannaðum KÍ liðið fekk LÍF einki burtur úr, men leingi stóð nógv á hjá KÍ*

Leirvíkingar fingu einki burturúr, tá teir leygardagin í Klaksvík gjørdu eina roynd at betra um hættisligu støðuna í botninum.

Klaksvíkingar høvdu nógv kend nøvn á næstbesta liðnum. Allir spælararnir uttan ein hava roynt seg í 1. deild, og tí var tað ikki óvæntað, at KÍ hevði øll stigini eftir í Klaksvík.

Men tað tók sína tíð, áðrenn stigini vóru í pottinum. Í 2. hálvleiki trýsti og trýsti KÍ, teir spældu seg til fleiri møguleikar, men Trygvi Olsen megnaði sera væl at verja fyri, og tá bólturin fór framvið honum, so rakti hann fleiri ferðir í stólpan og tvørtræið.

John Ryan skoraði sigursmálið í síðsta minuttinum. Hann varð spældur leysur av Tomislav Sivic.

LÍF kom á odda í 10. minutti. Miðvallarin Mirek Gil spældi við tunnli sera hegnisliga Jonhard Høgnesen leysan. Átta minuttir seinni javnaði miðvallarin Símun Joensen. Tomislav Sivic sneiddi í vinstru tveir mótstøðumenn av sær, áðrenn hann av baklinjuni trillaði bóltin út frá til U–18 landsliðsmannin.

LÍF kom framum aftur, tá Tomek Resel umsetti brotsspark til mál. KÍ málverjin var eitt sindur klossutur, tá hann tók um ein mótstøðumann, sum hevði stútað bóltin upp um hann, men við síðuna av málinum.

Í síðsta minuttinum undan steðginum javnaði Allan Joensen. Fríðin Ziskason spældi út um brotsteigin, Allan Joensen smekkaði til fyrstu ferð, og tað sang í netinum.

Seinnapartin av 2. hálvleiki vóru leirvíkingar bara tíggju. Niklas á Líðarenda vísti tvær ferðir gula kotið til Áslak Jacobsen, sum eftir seinna kortið eisini sá reytt.

Klaksvíkingar hava væl og virðiliga bjargað sínum liði undan niðurflyting. Í Leirvík stendur verri til. Teir flyta ikki beinleiðis niður, men um teir skulu sleppa undan at spæla um plássið í 2. deild, so mugu teir vinna, tá GÍ leygardagin kemur til Leirvíkar. Í síðsta umfarinum skal LÌF spæla ímóti B36 í Gundadali.

JH

**2. deild KÍ–LÌF 3–2 (2–2)**

0–1: Jonhard Høgnesen 10.
1–1: Símun Joensen 18.

**Vegna plásstrot var ikki rúmd fyri omanfyristandandi greinum í blaðnum í gjár. Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar**